# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 25.06.2026 kl. 17:30
**Málnr.:** 24/01278 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen, Hermann R. Samuelsen, Anfinn í Toft, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen
Varalimir: Hjalmar Zachariassen møtti fyri Sylviu Thomsen, og Símun á Høvdanum møtti fyri Fríðin Ziskason
Ikki møtt:
Onnur: John Færø, virkandi kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, journalfulltrúi

**Málsyvirlit**

**Til viðgerðar**

| | | |
|---|---|---|
| 66/26 | 26/00008-12 | Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi, Sylvia Thomsen og Fríðin Ziskason |
| 67/26 | 23/00033-11 | Fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrøð – byggibólkur og víðari tilgongdin |
| 68/26 | 21/01334-145 | Dagføring av Stangavegnum/Garðabrekkan |
| 69/26 | 25/01078-1 | Málsviðgeri innan umhvørvi |
| 70/26 | 26/00612-6 | Sundurbýti av matr.nr. 714x - raðhúsabygging á Fossum |
| 71/26 | 26/00662-3 | Sundurbýti í eigaraíbúðir - matr.nr. 1006ay, Klaksvík |
| 72/26 | 25/01091-4 | Arbeiðsbólk at arbeiða við gomlu Klaksvíkini |
| 73/26 | 25/01117-4 | Setan av arbeiðsbólki fyri Ítróttardepilin |
| 74/26 | 26/00052-1 | Leigumál Biskupstorg *Málið varð flutt til afturlatna fundin* |
| 75/26 | 26/00716-1 | Rakstrarkredittur, juni 2026 |
| 76/26 | 22/00548-30 | Vesi/bíðirúm á Eiðinum í Svínoy, fremjan – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 77/26 | 21/01342-48 | Miðbýur, byggibúningararbeiðið í 2026 – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 78/26 | 26/00684-1 | Framflytingar, íløgur 2025-2026, trivnaðarøkið – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 79/26 | 26/00654-1 | Framhald av avtalu við sertannlækna í ortodonti um tannrætting – Barnatannrøktin – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 80/26 | 26/00667-1 | Barnaverndartænastan, væntað meirnýtsla 2026 - *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 81/26 | 26/00668-1 | Kommunulæknar - væntað meirnýtsla 2026 – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 82/26 | 25/00395-7 | Kostpolitikkur fyri kommununa – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

| | | |
|---|---|---|
| 83/26 | 26/00657-1 | Sertoymi í Fjallafípuni – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 84/26 | 23/00827-17 | SíK3, Fremjan av útbygging av stadion í Klaksvík – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 85/26 | 26/00022-39 | Serflutningsskipanin – keyp av nýggjum bussi – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 86/26 | 26/00582-1 | Øktur tørvur á heimahjálp (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð* |
| 87/26 | 26/00583-1 | Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð* |
| 88/26 | 26/00584-1 | Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum fyri demenssjúk (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð* |
| 89/26 | 26/00585-1 | Flutningur til felags dagtilhaldið á Glyvrum til yngri borgarar við demensi (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð* |
| 90/26 | 26/00051-5 | Ferðavinnuætlan - Ætlan til góðkenningar |
| 91/26 | 26/00620-6 | Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2025, Klaksvíkar Býráð - ískoyti til grannskoðanarprotokollina *Málið varð flutt fram til almenna fundin* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 92/26 | 26/00534-3 | Møguligt keyp av lendi |
| 93/26 | 25/01354-14 | Møguligt keyp av lendi |
| 94/26 | 26/00646-3 | Yvirtøka og leingjan av leigusáttmála |
| 95/26 | 24/00581-44 | Ídni |
| 96/26 | 26/00664-1 | Barnaansingin á Kalsoynni |

**Til viðgerðar**

## 66/26
## 26/00008-12 Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi, Sylvia Thomsen og Fríðin Ziskason

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 66/26 |

**26/00008-12 Býráðslimum berst frá at møta á býráðsfundi, Sylvia Thomsen og Fríðin Ziskason**

**Frágreiðing um málið:**
Sylvia Thomsen, býráðslimur hevur boðað frá, at hon hevur forfall til býráðsfundin 25. juni 2026, vísandi til § 18, stk. 2 í kommunustýrislógini. Næstvaldur á valevnislistanum er Hjalmar Zachariassen.

Fríðin Ziskason, býráðslimur hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 25. juni 2026, vísandi til § 18, stk. 2 í kommunustýrislógini. Næstvaldur á valevnislistanum er Símun á Høvdanum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, §18. stk. 2 og 3.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýningar til tiltakslimirnar, um býráðið avger at lata teir taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Sylviu Thomsen og til innkalling av tiltakslimi fyri Fríðin Ziskason.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Einmælt samtykt at lata Hjalmar Zachariassen og Símun á Høvdanum taka sæti í býráðnum til fundin.

## 67/26
## 23/00033-11 Fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrøð – byggibólkur og víðari tilgongdin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 15.06.2026 | 32/26 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 86/26 |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 37/26 |
| 4 Tekniska Nevnd | 17.06.2026 | 55/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 75/26 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 67/26 |

**23/00033-11 Fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrøð – byggibólkur og víðari tilgongdin**

**Frágreiðing um málið:**
Nú tilgongdin er byrjað at fyrireika útbygging av frítíðarskúlanum, sum er ein fortreyt við víðari skúla-byggingini, verður málið – í samráð við B&U-nevndarforkvinnuna – við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir við tí fyri eyga at byrja tilgongdina at kanna og lýsa tørvin á Skúlatrøð í mun til komandi 2. og 3. byggistig og at gera tær fyrstu kortleggingarnar og skitsurnar.

Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2026 vórðu settar av 1.150.000 kr., harav tøka játtanin er **460.000 kr.**

Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagfest 04-06-2026, har m.a. verður greitt frá, at tá farið varð undir tilgongdina í 2014, var fyrireikingarbólkur mannaður við hesum persónum, ið tá vóru fleiri í tali, tí talan var tá um tveir skúlar, ið skuldu leggjast saman í ein: *Trivnaðarnevndarformaðurin (bólkaform.), *Borgarstjórin, *Trivnaðarnevndarlimur, *Skúlastjórin, *Varaskúlastjóri, *Læraraumboð, *Skúlastýrisforkvinnan, *Skúlastýrislimur, *Tekniski stjórin, *Trivnaðarstjórin og *Varatrivnaðarstjórin (skrivari).

Í hesum umfari er talan ikki um eina byrjan, men um eitt framhald av byggitilgongdini, og tí er væl møguligt, at bólkurin skal setast saman á annan hátt.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til, at **200.000 kr. verða játtaðar** av áður nevndu restjáttan á 460.000 kr. til at byrja hesa tilgongdina í hesum árinum (2026).

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir til viðgerðar og – um málið fær undirtøku – at manna byggi-/fyrireikingarbólkin.

**Ferðslunevndin 15. juni 2026:**
Nevndin varð kunnað um málið og minnir á, at tað er sera umráðandi, at ferðslunevndin og ferðslusamskiparin verða tikin við upp á ráð í tilgongdini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-06-2026.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 04.06.2026, og at limirnir verða staðfestir á býráðsfundinum.

**Tekniska Nevnd 17. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við FeN 15-06-2026 og B&U 16-06-2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við TN 17-06-2026.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt. Harumframt staðfest, at byggi-/fyrireikingarbólkurin verður mannaður við hesum umboðum: Annika S. Biskopstø, B&U-nevndarforkvinna; Karl H. Johansen, borgarstjóri; Eyðstein Ó. Poulsen, B&U-nevndarlimur; eitt umboð fyri skúlaleiðsluna; eitt læraraumboð; eitt skúlastýrisumboð; John Færø, trivnaðarstjóri, skrivari; Andreas Andreassen, tekniskur stjóri; og FuglArk, projekterandi ráðgevi.

## 68/26
## 21/01334-145 Dagføring av Stangavegnum/Garðabrekkan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 17.06.2026 | 50/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 80/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 68/26 |

**21/01334-145 Dagføring av Stangavegnum/Garðabrekkan**

**Frágreiðing um málið:**
Tekniska Fyrisiting hevur seinast mongu árini arbeitt við einari dagføring av Stangavegnum og Garðabrekkuni. Málið er samtykt av viðkomandi nevndum og býráði, og øll vegaætlanin og vegaføringar eru á sama hátt góðkendar av viðkomandi nevndum, ferðslugrannskoðara og av Klaksvíkar Býráð.

Víst verður til tilmæli frá Teknisku fyrisiting, dagfest 06-06-2026, har m.a. verður greitt frá, at hetta mál áður er útsett, og nú eru onkrar avbjóðingar, serliga norðast á Stangavegnum, og í Garðabrekkuni.

Talan er um tvey sethús:
*Eini sethús á matr.nr. 1208, ið Vegadeild kommununnar ætlandi skal taka niður.
*Eini sethús á matr.nr. 1160, ið skulu flytast til til matr.nr. 1110. Hesi kunnu væntandi seljast fyri eina upphædd nakað omanfyri samlaðu útreiðslurnar av hesum máli. Ætlanin er, at bjóða hetta arbeiðið út.

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja undirstøðukervi (gongubreytir, gongugeilar, koyrivegir og parkeringspláss) í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið fer møguliga at geva kommununi eina inntøku, sum er størri enn útreiðslurnar. Tá útbjóðing hevur verið, og størri vissa fæst um fíggjarligu viðurskiftini, verður málið um eina broyting av fíggjarætlanini fyri 2026 løgd fyri viðkomandi nevndir og býráð.

**Tilmæli:**
Málið er samtykt áður, og tí er talan um eina kunning, har tað samstundis verður lagt upp til, at TN og FíN staðfesta málið.

**Tekniska Nevnd 17. juni 2026:**
Nevndin mælir til, at umsitingin bjóðar arbeiðið at flyta og niðurtøku av húsum út.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Ein meiriluti, KHJ, AíT, OáL og JS, tekur undir við TN 17-06-2026.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 23-06-2026; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, AíT, HZ, JS, OáL, EÓP, SáH og ASJ), 1 atkvøðu ímóti (ASB); SVJ atkvøddi ikki.

## 69/26
## 25/01078-1 Málsviðgeri innan umhvørvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 71/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 87/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 69/26 |

**25/01078-1 Málsviðgeri innan umhvørvi**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til tilmæli, dagfest 08-06-2026, har Tekniska fyrisiting biður um heimild til at søkja eftir málsviðgera innan umhvørvi.

Seinnu árini hevur verið ein ávís misnøgd frá avvarðandi politiskum nevndum viðvíkjandi handfaring og raðfesting av umhvørvisviðurskiftum. Hetta stavar í høvuðsheitum frá, at økið í løtuni ikki er skipað við neyðugum serkunnleika og resursum innan umhvørvissøkið.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
Galdandi lógir og reglur viðvíkjandi umhvørvi

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Væntast kann, at kostnaðurin at seta eitt starvsfólk í starv er umleið kr. 500 tús. árliga, treytað av fakfelagi og útbúgving. Mett verður, at til ber at fíggja starvið av umhvørviskontuni í 2026, um starvið verður sett í september. Frá 2027 verður neyðugt at seta neyðuga játtan av til endamálið, sum viðførir eina varandi fíggjarliga binding frá 2027 og úteftir.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at Tekniska deild fær heimild til at søkja eftir og seta eitt umhvørvisstarvsfólk til umsitingina, við byrjan í september 2026.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-06-2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Ein meiriluti, KHJ, AíT og SVJ, tekur undir við UBN 15-06-2026.
Ein minniluti, JS og OáL, mælir til, at peningurin í staðin verður nýttur at uppraðfesta byggimálsviðgerðina á teknisku fyrisiting, so byggimálsviðgerðirnar kunnu avgreiðast skjótari.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 23-06-2026; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, ASB, AíT, SVJ og HZ) og 5 atkvøðum ímóti (JS, OáL, EÓP, SáH og ASJ).

## 70/26
## 26/00612-6 Sundurbýti av matr.nr. 714x - raðhúsabygging á Fossum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 78/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 70/26 |

**26/00612-6 Sundurbýti av matr.nr. 714x - raðhúsabygging á Fossum**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til umsókn dagf 17. mai 2026 um sundurbýti av matr.nr. 714x í samband við raðhúsabygging.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til málið:
Ognar- og byggisamtyktarlig viðurskifti:
    matr.nr. 714x: eigari: Sp/f 04.04.24 - vídd: 2630 m$^2$ – økispartur A2 (blandað íbúðar- og vinnuøki)
    Minsta mark grundøkjavídd pr. raðhús: 150 m$^2$

**Burðardygd og heimsmálini:**
Mál 11 – gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar.

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Við støði í omanfyrinevndu upplýsingum og staðfesting av, at umsóknin er í tráð við góðkendu byggiætlanina á økinum, mælir Tekniska Fyrisiting til at viðmæla.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-06-2026.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-06-2026.

## 71/26
## 26/00662-3 Sundurbýti í eigaraíbúðir - matr.nr. 1006ay, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 79/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 71/26 |

**26/00662-3 Sundurbýti í eigaraíbúðir - matr.nr. 1006ay, Klaksvík**

**Frágreiðing um málið:**
Sí tilmæli frá Teknisku fyrisiting, dagfest 08-06-2026, í sambandi við, at Betri Heim vegna eigaran, sp/f NH Grevstur, søkir um loyvi at býta sethús í gerð á matr.nr. 1006ay, Millum Hjalla, í tvær sjálvstøðugar búeindir/íbúðir

Byggisamtyktarliga er talan um staðseting í økisparti A18 við ásetingini: Blandað íbúðar- og vinnuendamál. – Minsta krav vídd grundøki pr. íbúð er 150 m$^2$. – Við sundurbýti av sethúsunum á matr.nr. 1006ay verður grundøkjavíddin 257 m$^2$ pr. íbúð.

Fyri at játta umsóknini um sundurbýti til íbúðir krevst, at býráðið játtar frávik frá kravinum í stk. 2 í ognarbrævinum, sum er soljóðandi: "*Á grundstykkinum er ikki loyvt at byggja annað enn sethús ella tvíhús. Frávik frá hesum krevst loyvi frá kommununi*".

**Burðardygd og heimsmálini:**
Stuðlar undir heimsmáli nr. 11 um at gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir við seinni broytingum

**Fíggjarligar avleiðingar:**

-

**Tilmæli:**

Vísandi til,

- at ynski umsøkjarans er í tráð við ásetingarnar í byggisamtyktini,
- at bygningin sambært byggiloyvi lýkur krøvini til íbúðarbygging,
- at byggingin er í tráð við stk. 1 og 2 í ognarbrævinum um ”sethús”, og tí ikki lýtir dámin av sethúsaøki, (frávikið snýr seg um, at sethúsini verða sundurbýtt í tvær sjálvstøðugar matrikulerar búendir (íbúðir).
- at byggingin annars lýkur allar byggisamtyktarligu ásetingarnar,

verður mælt til at játta neyðugt frávik frá stk. 2 í ognarbrævinum, treytað av, at reglurnar í løgtingslóg um eigaraíbúðir verða fylgdar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-06-2026.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**

Tilmælið frá UBN 15-06-2026 einmælt samtykt.

## 72/26
## 25/01091-4 Arbeiðsbólk at arbeiða við gomlu Klaksvíkini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 17.06.2026 | 43/26 |
| 2 Mentanarnevndin | 16.06.2026 | 42/26 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 87/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 72/26 |

**25/01091-4 Arbeiðsbólk at arbeiða við gomlu Klaksvíkini**

**Frágreiðing um málið:**

Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagfest 08-06-2026, har m.a. verður greitt frá, at kommunan eigur bygningar í gomlu Klaksvíkini, har óvist enn er, hvat skal gerast við teir, og tí hevði verið skilagott at sett ein arbeiðsbólk at arbeitt við einari heildarætlan fyri økið.

Arbeiðsbólkurin skal arbeiða við at greina og seta fram uppskot um framtíðar nýtslu, varðveiting og menning av økinum, herundir serliga hesar bygningar: *Ídni, *gamla Havnaskrivstovan og *Pisshúsið, sum eru fastognir hjá kommununi, umframt: *Norðoya Fornminnissavn og *Faktorshúsini, sum eru fastognir hjá Norðoya Fornminnafelag.

Endamálið er at skapa eina samanhangandi og burðardygga ætlan, sum tekur hædd fyri bæði: *mentanarligum og søguligum virðum, *almennari nýtslu og virksemi, *ferðavinnu og upplivingarbúskapi og *framtíðar menning av miðbýarøkinum.

Arbeiðsbólkurin, sum verður mannaður við umboðum úr politisku skipanini og umsitingini, umframt umboðum við viðkomandi fakligum kunnleika, fær til uppgávu at: *gera eina samlaða støðumeting av

økinum og bygningunum, *lýsa møguleikar og avbjóðingar í mun til varðveiting og nýtslu, *arbeiða við hugskotum og kósum fyri framtíðar menning, *koma við ítøkiligum tilmælum til politiska viðgerð.

Úrslitið av arbeiðinum skal leggjast fyri viðkomandi nevnd og síðani Býráðið til støðutakan.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Trupult at siga, hvørjar útreiðslur verða, áðrenn avgjørt verður, hvør verður umboðaður í arbeiðsbólkinum. Ongin avseting er til endamálið í løtuni.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndirnar taka undir við at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við økinum í gomlu Klaksvíkini

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-06-2026.

**Mentanarnevndin 16. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 15-06-2026, og mælir til, at forarbeiðið frá 2020 verður endurskoðað, og uppskot um limir í arbeiðsbólkinum verður avgreitt á býráðsfundi.

**Havna- og Vinnunevndin 17. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 16-06-2026

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá HaVN 17-06-2026 einmælt samtykt. Harumframt samtykt, at arbeiðsbólkurin verður mannaður við hesum umboðum: Karl H. Johansen, borgarstjóri; Signhild V. Johannesen, mentanarnevndarforkvinna; Fríðin Ziskason, býráðsminnilutaumboð; eitt umboð fyri fornminnasavnið; og Edward Fuglø, listafólk. Dávur Winther, umboð fyri mentanardeildina, verður skrivari.

## 73/26
## 25/01117-4 Setan av arbeiðsbólki fyri Ítróttardepilin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.06.2026 | 43/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 73/26 |

**25/01117-4 Setan av arbeiðsbólki fyri Ítróttardepilin**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til tilmæli, dagfest 08-06-2026, har m.a. verður greitt frá, at tað fleiri ferðir er blivið umrøtt, at neyðugt er at gera eina heildarætlan fyri ítróttarøkið, áðrenn arbeiðið við at fáa nýggj skiftingarrúm í KÍ-høllina verður sett í gongd, so hetta ikki forðar fyri framtíðarætlanum fyri alt økið.

Mælt verður til, at Býráðið samtykkir at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða miðvíst við framtíðar menning, skipan og tillaging av ítróttarøkinum í kommununi.

Arbeiðsbólkurin verður skipaður soleiðis:

- Borgarstjórin (formanssess)
- Forfólkið í Mentanarnevndini
- Eitt umboð fyri minnilutan í Býráðnum
- Umboð fyri umsitingina
- Evt. eitt umboð við fakligum kunnleika innan økisplanlegging/arkitektur

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avseting er til endamálið, og uml. helvtin er brúkt.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við tilmælinum at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við skipan og raðfesting av ítróttarøkinum.

**Mentanarnevndin 16. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-06-2026, og uppskot um limir í arbeiðsbólkinum verður avgreitt á býráðsfundi.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá MeN 16-06-2026 einmælt samtykt. Harumframt samtykt, at arbeiðsbólkurin verður mannaður við hesum umboðum: Signhild V. Johannesen, forkvinna í MeN verður forfólk í bólkinum, Anfinn í Toft, formaður í UBN; Fríðin Ziskason, umboð fyri býráðsminnilutan; Torkil Mørkøre, leiðari á ítróttarøkinum, og umboð fyri umsitingina (navnið kemur seinni), sum verður skrivari. Bólkurin velur sjálvur eitt fólk, umboðandi fakkunnleika innan økisplanlegging/arkitektur.

## 74/26
## 26/00052-1 Leigumál Biskupstorg

*Málið varð flutt til afturlatna fundin*

## 75/26
## 26/00716-1 Rakstrarkredittur, juni 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 64/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 75/26 |

**26/00716-1 Lántøka, 2026**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 18-06-2026, sum í stuttum snýr seg um, at mælt verður til útvega ein rakstrarkreditt á 20 mió.kr. orsakað av teprum gjaldføri.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
§ 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Við kreditti á 20 mió. kr. hækka renturnar nakað. Um miðaltrekkið verður 5 mió. kr., er talan um áleið kr. 100.000.

Um eykajáttanir verða samtyktar, verður neyðugt at útvega meira gjaldføri seinni í árinum.

Nevnast skal, at eykajáttanir eru fyri nú, og summar fáa seinnu viðgerð eftir summarfrítíðina. Tá fæst nærri at vita, hvussu langt verandi gjaldføri røkkur.

Gjøgnumgongd av roknskapinum januar – apríl vísir, at summi rakstrarstøð hava avbjóðingar við at halda játtanirnar. Um inntøkurnar ikki hækka samsvarandi, gongur tað út yvir gjaldførið, og tí kann verða neyðugt at útvega enn meira fígging seinni í árinum.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at kommunan útvegar sær rakstrarkreditt á 20 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 18-06-2026, og at umsitingin útvegar sær tilboð frá veitarum upp á kredittin.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

## 76/26
## 22/00548-30 Vesi/bíðirúm á Eiðinum í Svínoy, fremjan – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 85/26 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 17.06.2026 | 49/26 |
| 3 Tekniska Nevnd | 17.06.2026 | 52/26 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 79/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 76/26 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**22/00548-30 Vesi/bíðirúm á Eiðinum í Svínoy - fremjan**

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 08-06-2026, verður greitt nærri frá málinum um tilgongdina viðv. bygging av vesi/bíðirúmi á Eiðinum í Svínoy.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Arbeiðið steðgaði upp vegna vantandi fígging. Í 2025 varð málið viðgjørt, men av onkrari orsøk so varð peningurin 300 tkr. ikki tøkur á fíggjarætlanini fyri 2025.

Málið verður við hesum sent til UBN, HaVN, TN og FíN til viðgerðar, har víst verður til málið um framflyting av óbrúktari játtan mál nr. 26/00669, frá fíggjarárinum 2025 til 2026, har lagt verður upp til, at 300 tkr. verða fluttar til *Fastognir Íløgur*, tilskilað vesi og bíðirúmið í Svínoy.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Vísast kann á mál nr. 9 og 11, sum umfatar undirstøðukervi og burðardyggir býir og býlingar, sum Føroya Landsstýri og Klaksvíkar kommuna hava tikið undir við.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Eingin peningur er játtaður serstakt til málið.
Um tikið verður undir við málinum, verður neyðugt at broyta fíggjarætlanina fyri 2026 íløgupartin, har 300 tkr. gerast tøkar til *Fastognir Íløgur*, avsett til bíðirúmið í Svínoy. Talan er um broyting av fíggjarætlanini, og tí skal málið hava tvær viðgerðir.

**Tilmæli:**
Málið hevur bíðað ov leingi. Tí mælir Tekniska Fyrisiting til eina eykajáttan í 2026 uppá 300 tkr., soleiðis at bíðirúmið og vesið á Eiðinum í Svínoy verður gjørt liðugt í ár.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**
Nevndin mælir til at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2027.

**Havna- og Vinnunevndin 17. juni 2026:**
Ein meiriluti, ST, SVJ og AíT, taka undir við UBN, dagf. 15-06-2026.
Ein minniluti, OáL og FZ, mælir til, at bíðirúmið á Eiðinum verður staðsett, har tað upprunaliga stóð, tvs. nærri Eiðinum.

**Tekniska Nevnd 17. juni 2026:**
Ein meiriluti, HRS, ST og AíT, tekur undir við meirilutanum í HaVN 17-06-2026.
Ein minniluti, OáL og EÓP, tekur undir við minnilutanum í HaVN 17-06-2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Ein meiriluti, KHJ, AíT, og SVJ, tekur undir við meirilutanum í TN 17-06-2026.
Ein minniluti, OáL, tekur undir við minnilutanum í TN 17-06-2026.
JS tekur støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 23-06-2026; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, ASB, AíT, SVJ, HZ, JS, SáH og ASJ) og 1 atkvøðu ímóti (OáL); EÓP atkvøddi ikki.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**77/26**
**21/01342-48 Miðbýur, byggibúningararbeiðið í 2026 – *eykajáttan, fyrra viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 84/26 |
| 2 Tekniska Nevnd | 17.06.2026 | 51/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 78/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 77/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**21/01342-48 Miðbýur - byggibúningararbeiðið í 2026**

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 08-06-2026, verður meting gjørd um fíggjarliga tørvin í 2026. Nevndar verða verkætlanirnar viðv. byggibúning kring nýggja hotellið, byggibúning kring Rótina, koyrivegur o.a. millum hotellið og íbúðabyggingina hjá Lív, og vegurin millum Føroya Tele og Betesda.

Samlaður meirkostnaður í samband við byggibúningararbeiðið í miðbýnum er sambært skrivinum 4,5 mió. kr.

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja útstykkingar, miðstaðarøki (gongubreytir, gongugeilar, koyrivegir, parkeringspláss o.a.) í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Málið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri íløgusíðuna á fíggjarætlanini fyri 2026, vísandi til nevnda tørv upp 4,5 mió. kr. Um býráðið tekur undir við einari eykajáttan uppá 4,5 mió. kr., so skal málið samtykkjast tvær ferðir, og kostnaðurin fíggjast við lántøku.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-06-2026.

**Tekniska Nevnd 17. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við UBN 15-06-2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-06-2026, við hesum broytingum:
500 tkr. til fyribils asfaltering verða ikki játtaðar, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi*.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 78/26
## 26/00684-1 Framflytingar, íløgur 2025-2026, trivnaðarøkið – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 29/26 |
| 2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 16.06.2026 | 33/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 67/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 78/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**26/00684-1 Framflytingar, íløgur 2025-2026 - trivnaðarøkið**

**Frágreiðing um málið:**
Í fíggjarárinum 2025 samtykti býráðið tríggjar íløgujáttanir til fylgjandi verkætlanir, sum ikki vóru liðugt framdar við ársenda 2025, og tí mugu restjáttanirnar flytast fram til 2026 – talan er um hesar:

| Rakstrarstaðnr. | Rakstrarstað navn: | Projekt: | Restjáttan: |
|---|---|---|---|
| 02202370132 | Skúlatannlæknin (Íløga) | Skúlatannlæknin | 1.000.000 |
| 03261170132 | Barnaansing felags (Íløgur) | Útiøki Mylnuhúsið | 1.227.000 |
| 03261170132 | Barnaansing felags (Íløgur) | Baldursbrá útbygging | 3.500.000 |

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir nakra nýggja útreiðslu, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí talvuna undir frágreiðing um málið.

Framflyting av óbrúktum íløgujáttanum frá 2025 til at brúka í 2026 svarar til eykajáttan í 2026, sum smb. kommunustýrislógini krevur tvær býráðssamtyktir við minst 14 daga millumbili.

**Tilmæli:**
Mælt verður nevndum og býráð at samtykkja tær í hesum tilmæli útgreinaðu framflytingar av restjáttanum í 2025 sambandi við íløgur á trivnaðarøkinum til at brúka í 2026, soleiðis at nevndu íløgur kunnu verða gjørdar lidnar.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 10.06.2026.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við TrN B&U 16.06.2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-06-2026, men at framflytingin "Baldursbrá útbygging" ljóðar upp á 2,5 mió.kr.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

# 79/26
# 26/00654-1 Framhald av avtalu við sertannlækna í ortodonti um tannrætting – Barnatannrøktin – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 32/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 70/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 79/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**26/00654-1 Framhald av avtalu við sertannlækna í ortodonti um tannrætting – Barnatannrøktin (eykajáttan)**

**Frágreiðing um málið:**
*Hetta málið verður lagt fyri politisku skipanina eftir áheitan frá býráðsleiðsluni á okkum stjórar um – nú í juni umfarinum – at gera vart við allar meirnýtslur, sum vit meta vanda vera fyri í inniverandi fíggjarári.*

*Eftir áheitan frá býráðsleiðsluni verða allar hesar væntaðu meirnýtslur samstundis skrásettar í eitt felags yvirlit, sum Roknskapardeildin leggur fyri fíggjarnevndina.*

Sí tilmæli frá umsitingini, dagfest 01-06-2026, har m.a. verður greitt frá, at sertannlæknin í ortodonti síðan í fjør heyst hevur verið føst hølir, sum hevur havt avleiðingar fyri virksemið og tænasturnar, og sum avleiðing av hesum varð avtalað, at veitarin faktureraði fyri hálvt gjald frá og við oktober í 2025.

Umsitingin hevur – saman við tannlæknaleiðaranum – samskift við hinar báðar kommunurnar í hesum samstarvi, um at leingja samstarvið við veitaran, sum eftir summarferiuna byrjar aftur í egnum hølum.

Harvið kann veitarin arbeiða tað innaftur, sum ikki er viðgjørt í tíðarskeiðnum frá oktober 2025 til d.d., sum víðari krevur, at fulla gjaldið aftur verður sett í verk fyri alt tíðarskeiðið (frá okt. í 2025 til d.d.).

Tað er hetta, sum gevur Barnatannrøktini eina væntaða meirnýtslu í ár á ca 150 tkr. - tí hetta mál.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at farast kann ikki undir útreiðslur, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Umsitingin hevur spurt tannlæknaleiðaran um møguleikarnar fyri at bera henda eyka kostnað í ár innan verandi játtan fyri 2026. Hetta kann tíverri ikki garanterast, tí útreiðslurnar hjá Barnatannrøktini eru flest allar fastar.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at samtykkja eina eykajáttan – fíggjaða við lántøku – til fígging av væntaðu meirnýtsluni vegna meirútreiðslur til tannrætting í 2026, sum stava frá 2025. Eisini verður mælt til at taka undir við viðfesta uppleggi til "*avtalu við sertannlækna í ortodonti um tannrætting*", galdandi frá 1. aug. 2026 til 31. juli 2031, sum verður grundarlagið fyri samráðing við Sp/f Boyla í næstum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 05.06.2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við B&U 16-06-2026, og at eykajáttanin verður fíggjað við *tøkum peningi*.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

## 80/26
## 26/00667-1 Barnaverndartænastan, væntað meirnýtsla 2026 – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 33/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 68/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 80/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**26/00667-1 Barnaverndartænastan – væntað meirnýtsla 2026 (eykajáttan)**

**Frágreiðing um málið:**
*Hetta málið verður lagt fyri politisku skipanina eftir áheitan frá býráðsleiðsluni á okkum stjórar um – nú í juni umfarinum – at gera vart við allar meirnýtslur, vit meta vanda vera fyri í inniverandi fíggjarári.*

*Eftir áheitan frá býráðsleiðsluni verða allar hesar væntaðu meirnýtslur samstundis skrásettar í eitt felags yvirlit, sum Roknskapardeildin leggur fyri fíggjarnevndina.*

Sí tilmæli frá umsitingini, dagfest 08-06-2026, har m.a. ein framrokning fyriliggur av væntaðu nýtsluni hjá BVT við støði í bókaðu nýtsluni pr. d.d.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at farast kann ikki undir útreiðslur, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Samlaða metta meirnýtslan í inniverandi ári (2026) er 2.000.000 kr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at samtykkja eina eykajáttan á 2.000.000 kr. – fíggjaða við lántøku – til fígging av væntaðu meirnýtsluni vegna meirútreiðslur til barnaverndartænastuna í 2026.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin er kunnað og samtykti at játta Barnaverndartænastuni í Norðoyggjum eykajáttan á kr. 1.000.000. Málið verður tikið upp aftur í septembur 2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við B&U 16-06-2026. Nevndin heitir á umsitingina um at fáa eitt samskifti í lag við Barnaverndartænastuna um fíggjarligu avbjóðingarnar v.m.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

**81/26**
**26/00668-1 Kommunulæknar, væntað meirnýtsla 2026 – *eykajáttan, fyrra viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 16.06.2026 | 35/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 71/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 81/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**26/00668-1 Kommunulæknar – væntað meirnýtsla 2026 (eykajáttan)**

**Frágreiðing um málið:**
*Hetta málið verður lagt fyri politisku skipanina eftir áheitan frá býráðsleiðsluni á okkum stjórar um – nú í juni umfarinum – at gera vart við allar meirnýtslur, vit meta vanda vera fyri í inniverandi fíggjarári.*

*Eftir áheitan frá býráðsleiðsluni verða allar hesar væntaðu meirnýtslur samstundis skrásettar í eitt felags yvirlit, sum Roknskapardeildin leggur fyri fíggjarnevndina.*

Í ár eru 20 ár síðan, at Læknamiðstøðin við Sandin varð tikin í brúk, og var hon tá ein hin fremsta og mest nútímans á økinum.

Nú 20 ár eru liðin, har tey seinastu árini ikki hava verið merkt av nýgerð, dagføringum og als ikki av víðkan, eru vit so smátt byrjað at merkja avleiðingarnar av hesum. Høliskarmarnir eldast og slítast, og tørvurin á dagføringum er sjónligur. Samstundis bankar ein víðkan av karmunum á dyrnar.

Ein fastur kommunulækni er tíverri farin úr starvi her í læknadøminum, so vit nú hava tveir fastar læknar til fýra viðtalur. Umframt verri tænastu, skapar hetta meirútreiðslur í rakstrinum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at farast kann ikki undir útreiðslur, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mett meirnýtsla í inniverandi ári (2026) er 200.000 kr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at samtykkja eina eykajáttan á 200.000 kr. – fíggjaða við lántøku – til fígging av væntaðu meirnýtsluni vegna meirútreiðslur til Kommunulæknar í 2026.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 08.06.2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B 16-06-2026, og at eykajáttanin verður fíggjað við *tøkum peningi*.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

**82/26**
**25/00395-7 Kostpolitikkur fyri kommununa – *eykajáttan, fyrra viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 30/26 |
| 2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 16.06.2026 | 34/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 69/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 82/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**25/00395-7 Kostpolitikkur fyri kommununa – Annika S. Biskopstø forkv. í TrN B&U**

**Frágreiðing um málið:**
Á fundi í B&U 20. januar 2026 varð samtykt at arbeiða víðari við kostpolitikki fyri børn og ung í kommununi, og at ein arbeiðsbólkur við viðkomandi pørtum verður settur.

Vísandi til omanfyristandandi verður málið við hesum lagt fyri aftur til tess at útvega fígging til at fara undir hetta arbeiði – sí niðanfyri – har mælt verður til eina flyting millum kontur innan trivnaðarøkið, soleiðis at hetta átak verður fíggjarliga útreiðsluneutralt.

Tá ið arbeiðsbólkurin er mannaður, og hesin hevur lagt eina arbeiðs- og tíðarætlan fyri arbeiðið, verður málið lagt fyri nevndina aftur at góðkenna víðari tilgongdina. Hetta verður ætlandi í fyrsta fundarumfari eftir summarsteðgin, tvs. í september mánaði.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir eina nýggja útreiðslu, uttan at játtan fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Enn er ilt at koma við nakrari neyvari kostnaðarmeting fyri hetta ætlaða arbeiði, men til tess at tryggja nóg mikið av peningi til eitt væl út hondum greitt tilmæli um kostpolitikk, verður mælt til at seta av 150 tkr. til hetta.

**Tilmæli:**
Biðið verður um heimild til at fara undir at orða ein kostpolitikk fyri Klaksvíkar kommunu eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti, sum verður fíggjaður við at flyta 150.000 kr. millum kontur frá íløgujáttanini til projektið "Matarskipan" og til eina rakstrarjáttan til rakstrarstaðið "Heilsumál" (ella annað rakstrarstað, um tað verður mett rættari bókhaldsliga), sum verður at liggja undir ræði hjá Trivnaðarnevndini Børn og Ung.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 03.06.2026.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við TrN B&U 16.06.2026.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við TrN E&B 16.06.2026, og at endalig manning av arbeiðsbólkinum verður løgd fyri komandi nevndarumfar.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

## 83/26
## 26/00657-1 Sertoymi í Fjallafípuni – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 16.06.2026 | 34/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 73/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 83/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.09.2026 | |

**26/00657-1 Sertoymi í Fjallafípuni**

**Frágreiðing um málið:**
**Sertoymi í Fjallafípuni**
Víst verður til tilmæli frá umsitingini, dagfest 05-06-2026, har m.a. verður greitt frá, at ein arbeiðsbólkur í umsitingini seinastu tíðina hevur arbeitt við at finna fram til best møguliga tilboðið í Fjallafípuni til børn við serligum tørvi, og fyri at skapa eina góða yvirgongd frá tí tilboði, børnini eru ein partur av frammanundan, og víðari til Fjallafípuna.

Niðurstøða bólksins er, at eitt tilboð í Fjallafípuni eigur at verða skipað soleiðis, at tað byggir víðari á arbeiðið, sum er gjørt í Perluni og í øðrum stovnum. Tó mælir bólkurin til, at skipanin av sertilboði í Fjallafípuni verður tikin við útgangsstøði í serstovuni í Miðgarði og í Perluni. Hetta merkir, at eitt sertoymi við starvsfólkum verður sett, sum kemur at arbeiða í "lítla húsinum" í Fjallafípuni.

Endamálið við hesi tilgongd er at skapa ein starvsfólkabólk við servitan, sum kann bjóða børnunum við ymiskum avbjóðingum eitt gott, mennandi og námsfrøðiligt tilboð.

**Lógargrundarlag:**
Dagstovnalógin, *§ 5. "Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3.*
*Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð".*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan er um eitt nýtt sertilboð, sum harvið krevur eina nýggja játtan á 450.000 fyri inniverandi ár (2026).

Henda tilmælta játtan kann metast sum ein íløga, sum sparir á øðrum økjum, tí verður henda uppraðfesting av fyribyrgjandi arbeiði í Fjallafípuni ikki gjørd, fara útreiðslur á øðrum økjum at økjast, so sum hjá NR.

Mælt verður til, at hendan játtan verður partur av rakstrarstaði nr. 03261170010 "Fjallafípan", og verður fíggjað við at flyta 250.000 kr. frá rakstrarstaðnum Blómugarður og 200.000 kr. Frá rakstrarstaðnum Ung í Arbeiði - samanlagt 450.000 kr.

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri Trivnaðarnevndina Børn og Ung til støðutakan, um sertilboðið í Fjallafípuni skal skipast eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti. Um tikið verður undir við hesum, verður mælt til at fíggja

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

hesa uppraðfesting við flytingum millum kontur frá øðrum játtanum á trivnaðarøkinum, so sum lýst í hesum tilmæli.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. juni 2026:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 05.06.2026, men nevndin ynskir eina neyvari lýsing av fíggjarligu avleiðingunum lagdar fyri FíN.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Ein meiriluti, KHJ, AíT og JS, tekur undir við B&U 16-06-2026 men mælir til, at peningurin ikki verður tikin frá játtanini til *Ung í Arbeiði* men verður fíggjaður av *tøkum peningi.*
Ein minniluti, OáL, tekur undir við B&U 16-06-2026, men at peningurin ikki verður tikin frá játtanini til *Ung í Arbeiði* men verður funnin innan verandi karm.
Ein minniluti, SVJ, tekur ikki undir við fíggingarleistinum fyri málið.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 23-06-2026; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, ASB, AíT, HZ, JS, EÓP, SáH og ASJ) og 1 atkvøðu ímóti (SVJ); OáL atkvøddi ikki.

## 84/26
## 23/00827-17 SíK3, Fremjan av útbygging av stadion í Klaksvík – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.05.2026 | 31/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 49/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 45/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 84/26 |

**23/00827-17 SíK3 – Fremjan av útbygging av stadion í Klaksvík - Eykajáttan**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 28. mai 2026.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Meirkostnaðurin er uml. 2,1 mió., sum má eykajáttast av *tøkum peningi*.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við eykajáttan á 2,1 mió. til meirkostnaðin í Hornaskýlinum

**Mentanarnevndin 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-05-2026.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við MeN 19-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, AíT, SVJ, ST, OáL, EÓP, FZ og ASJ) og 1 blankari atkvøðu (ASB).

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
*Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*
Atkvøtt varð um tilmælið frá BýR 28-05-2026; tað varð samtykt við seinnu viðgerð við 9 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, AíT, SVJ, HZ, OáL, EÓP, SáH og ASJ) og 1 blankari atkvøðu (ASB).

## 85/26
## 26/00022-39 Serflutningsskipanin, keyp av nýggjum bussi – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 21/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 51/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 55/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 85/26 |

**26/00022-39 Serflutningsskipanin – keyp av nýggjum bussi - eykajáttan**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 28. mai 2026.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir nakra útreiðslu, uttan at játtan til hesa fyriliggur.

Kommunustýrislógin hevur somuleiðis hesar ásetingar:
§ 21, *Stk. 3.* Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva.
§ 31, *Stk. 2.* Nevndarformaður kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða, ella har ongin orsøk er til iva. Tó skal borgarstjórin kunnast, áðrenn avgerð verður tikin í málum, ið ikki tola at bíða, uttan so er, at tað snýr seg um avgerðir, sum við lóg eru latnar nevndini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| | Prísur u/mvg | v/kommunu-mvg |
|---|---|---|
| Keypskostnaður, nýggjur serflutningsbussur | 564.700 kr. | 599.993,75 kr. |
| Mettur søluprísur fyri gamla bussin | -100.000 kr. | -106.250,00 kr. |
| = Keypsprísur netto | 464.700 kr. | 493.743,75 kr. |

Tá ið verandi serflutningsbussur varð keyptur, varð hann skrásettur hjá Heiminum við Vágna.
Um sama mannagongd verður brúkt ísv. hetta keypið, sleppur kommunan heilt undan mvg.
Tvs. samlaður netto keypsprísur verður tá 464.700 kr.

Eingin avseting er í inniverandi fíggjarætlan til hetta keyp, sum tí krevur eina eykajáttan, um eingin flyting millum kontur letur seg gera.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið við umbøn um eykajáttan í inniverandi ári á 464.700 kr. til keyp av nýggjum serflutningsbussi.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 11-05-2026.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við E&B 19-05-2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá BýR 28-05-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 86/26
## 26/00582-1 Øktur tørvur á heimahjálp (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 22/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 52/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 56/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 86/26 |

**26/00582-1 Øktur tørvur á heimahjálp (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 28. mai 2026.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

Býtið av útreiðslunum millum kommunurnar sæst í talvuni niðanfyri:

| | Íbúgvar 67+ 31-12-2024 | Partur av útr. (%) | At gjalda |
|---|---|---|---|
| Fugloyar | 7 | 0,63 | 7.959 |
| Viðareiðis | 44 | 3,95 | 50.027 |
| Hvannasund | 80 | 7,18 | 90.959 |
| Klaksvíkar | 961 | 86,27 | 1.092.641 |
| Kunoyar | 22 | 1,97 | 25.014 |
| | **1114** | **100,00** | **1.266.600** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá BýR 28-05-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 87/26
## 26/00583-1 Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 23/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 53/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 57/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 87/26 |

**26/00583-1 Bólkaleiðarar til Norðoya Røktarheim (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 28. mai 2026.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

Býtið av meirútreiðslunum, síggjast í talvuni niðanfyri:

| | Íbúgvar 67+ 31-12-2024 | Partur av útr. (%) | At gjalda |
|---|---|---|---|
| Fugloyar | 7 | 0,63 | 2.170 |
| Viðareiðis | 44 | 3,95 | 13.641 |
| Hvannasund | 80 | 7,18 | 24.803 |
| Klaksvíkar | 961 | 86,27 | 297.940 |
| Kunoyar | 22 | 1,97 | 6.821 |
| | **1114** | **100,00** | **345.375** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndi tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá BýR 28-05-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 88/26
## 26/00584-1 Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum fyri demenssjúk (NBH) - *eykajáttan (KK), seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 24/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 54/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 58/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 88/26 |

**26/00584-1 Fígging av felags dagtilhaldi á Glyvrum fyri demenssjúk (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 28. mai 2026.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

parturin hjá NBH, býttur millum kommunurnar í Norðoyggjum:

| FÆ2026, dagt. á Glyvrum | Íbúgvar 01-11-2025 | Partur av útr. (%) | At gjalda | Íroknað væntaðar inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | 48 | 0,74 | 6.216 | 6.153 |
| Viðareiðis | 329 | 5,08 | 42.607 | 42.172 |
| Hvannasund | 426 | 6,58 | 55.168 | 54.606 |
| Klaksvíkar | 5.523 | 85,30 | 715.247 | 707.949 |
| Kunoyar | 149 | 2,30 | 19.296 | 19.099 |
| | **6.475** | **100,00** | **838.534** | **829.979** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá BýR 28-05-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 89/26
## 26/00585-1 Flutningur til felags dagtilhaldið á Glyvrum til yngri borgarar við demensi (NBH) - *eykajáttan (KK), eykajáttan*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 19.05.2026 | 25/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.05.2026 | 55/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 59/26 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 89/26 |

**26/00585-1 Flutningur til felags dagtilhaldið á Glyvrum til yngri borgarar við demensi (NBH) - eykajáttan (KK)**

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 28. mai 2026.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
§ 7., stk. 8. Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. *Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum*.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Verða lýstar í viðfesta samtyktarskjali.

Niðanfyri sæst býtið av útreiðslum hjá kommununum. Gev gætur, at talan er um borgarar í øllum aldri og ikki yvir 67 ár.

| | Íbúgvar 01-11-2025 | Partur av útr. (%) | At gjalda |
|---|---|---|---|
| Fugloyar | 48 | 0,74 | 2.002 |
| Viðareiðis | 329 | 5,08 | 13.719 |
| Hvannasund | 426 | 6,58 | 17.764 |
| Klaksvíkar | 5.523 | 85,30 | 230.303 |
| Kunoyar | 149 | 2,30 | 6.213 |
| | **6.475** | **100,00** | **270.000** |

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfesta samtyktarskjal frá NBH, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. mai 2026:**
Nevndin tekur kunningina til eftirtektar.

**Fíggjarnevndin 26. mai 2026:**
Nevndin tekur undir við NBH 7. mai 2026.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 26. mai 2026 einmælt samtykt, og at eykajáttanin verður fíggjað av *tøkum peningi.*

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá BýR 28-05-2026 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 90/26
## 26/00051-5 Ferðavinnuætlan - Ætlan til góðkenningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.05.2026 | 29/26 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 20.05.2026 | 33/26 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.05.2026 | 43/26 |
| 4 Mentanarnevndin | 16.06.2026 | 44/26 |
| 5 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 90/26 |

## 26/00051-5 Ferðavinnuætlan - Ætlan til góðkenningar

**Frágreiðing um málið:**
Smb løgtingslóg nr. 66 frá 30.mei 2024, er álagt kommununum at gera eina ferðavinnuætlan og er nú 1. Útkast til hesa lóg lagt fyri nevndirnar til góðkenningar, áðrenn hesa skulu sendast til landstýrisfólkið til góðkenningar.
Ferðavinnuætlanin er viðheft í málinum, men verður eisini latin limunum í nevndini í pappírsformi.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Ein ferðavinnuætlan stuðlar serliga undir Heimsmál 8, 11, 12, 15 og 17 við at fremja burðardyggan búskaparvøkstur, tryggja javnvág í lokalsamfeløgum, verja náttúrutilfeingi og styrkja samstarv millum almennar og privatar partar.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 66 frá 30. mei 2024
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ítøkiligu fíggjarligu avleiðingarnar av hesum máli er ein árlig útreiðsla á 96.000,- kr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at góðkenna ferðavinnuætlanina

**Mentanarnevndin 19. mai 2026:**
Nevndin ynskir at fáa málið fyri aftur á komandi fundi.

**Havna- og Vinnunevndin 20. mai 2026:**
Nevndin beinir málið í býráðið.

**Klaksvíkar Býráð 28. mai 2026:**
Málið tikið av skrá.

**Mentanarnevndin 16. juni 2026:**
Nevndin beinir málið í býráðið.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Ferðavinnuætlanin fyri kommunurnar í Norðoyggjum einmælt góðkend av Klaksvíkar Býráð.

## 91/26
## 26/00620-6 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2025 - Klaksvíkar Býráð - ískoyti til grannskoðanarprotokollina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.06.2026 | 65/26 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 25.06.2026 | 91/26 |

**26/00620-6 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2025 - Klaksvíkar Býráð - ískoyti til grannskoðanarprotokollina**

**Frágreiðing um málið:**
Grannskoðarin hevur gjørt ískoyti til protokollina viðvíkjandi roknskapinum 2025 ísbv. fyrispurning frá Jógvan Skorheim, býráðslimi, um viðgerð og góðkenningar í sambandi við lántøkur.

Víst verður til síðurnar 1029 – 1031 í protokollini, sum er viðløgd í málið.

Býráðslimirnir skulu undirskriva protokollina.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunulógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Einki at viðmerkja

**Tilmæli:**
Ískoytisprotokollin 2025 verður hervið løgd fyri fíggjarnevnd og býráð.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2026:**
Nevndin tekur undir við ískoytisprotokollini, dagf. 28. mai 2026, og beinir hana í býráðið.

**Klaksvíkar Býráð 25. juni 2026:**
Tilmælið frá FíN 23-06-2026 einmælt samtykt.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

**74/26**
**26/00052-1 Leigumál Biskupstorg**

**92/26**
**26/00534-3 Møguligt keyp av lendi**

**93/26**
**25/01354-14 Møguligt keyp av lendi**

**94/26**
**26/00646-3 Yvirtøka og leingjan av leigusáttmála**

**95/26**
**24/00581-44 Ídni**

**96/26**
**26/00664-1 Barnaansingin á Kalsoynni**

*Fundurin lokin 26. juni 2026 kl. 00.45*